# OUT
# R IN

politiskir brúkarar og aðrastaðni, har fólk, við nógvum resursum, eru íðin at luttaka í hesum døgum.

Eitt, sum er høgt í metum í sjálvsfatanini hjá modernaða samfelagsborgaranum er at kunna geva eitt sjálvstøðugt og orginalt íkast til sakina. Tað hevur jú altíð verið fínari at skapa nakað, enn at brúka tað sum longu er skapt.

Men í øllum hesum er og verður stóra avbjóðingin hjá tí einstaka at vera tilvitað um, hvørjar verkætlanir ella menningarætlanir viðkomandi luttekur í. Tí har má hann ella hon eisini taka ábyrgd og svara stórum spurningum sum: Hvar skal menniskjaheitin fara? Hvørji virði skulu vit umboða? Hvørjar uppgávur vilja vit loysa? Stutt og greitt mugu vit taka ábyrgd fyri okkara egnu menning, og ikki minst, menningini her á jørð.

**Eitt umfatandi megarák**

Sosiologurin Emilie von Hauen er sannførd um, at hetta er eitt rák, sum fer at raka hvønn einasta av okkum. Tí tað er eitt sonevnt megarák. Eitt rák, sum er so umfatandi, at tað rakar alt og øll í eini 20 ár fram í tíðina.

– Men, ert tú tilvitað um tað, kanst tú vera við til at velja kvalifiserað. Og at skapa kvalifiserað. Vera til reiðar at taka ímóti røðini av tilboðum, vørum, liviháttum og meiningum, sum altíð koma í kjalarvørrinum á nýggjum tendensum. Tú kanst sostatt sjálv vera við til at ávirka rákið og á tann hátt fáa sum mest burturúr. Fyri teg sjalva og øll onnur eisini, staðfestir hon.

